reportasjurøð | Lívið á Landssjúkrahúsinum

# Tá ið deyðin verður avdúkaður



**LÍKUPPSKURÐUR. Eftir eitt sonevnt »medico-legalt líksýn« verður gjørt av at skera líkið av einum manni upp. Endamálið við allarseinastu kanningini av sjúklinginum er at avdúka, hví maðurin doyði so brádliga og óvæntað. Men kanningin byrjar við, at tann lokali Dr. Quincy kannar líkið saman við løgregluni og rættarlæknaliga teknikaranum, Ova Berg Jacobsen**

**Hetta er seinasta av sjey reportasjum av Landssjúkrahúsinum**

## Reportasja



Høgni Mohr

Klokkan á skøvninginum á líkinum gongur, meðan vit bíða eftir landslæknanum. Alt kann vera roknað sum próvtilfar, og tí er líkið ikki nomið, síðan brádliga deyði maðurin varð lagdur í sjúkrahússeingina. Tað er løgreglan, sum hevur sent boð eftir landslæknanum.

Í líkrúminum arbeiðir rættarlæknaligi teknikarin, Ove Berg Jacobsen, einsamallur við at fáa líkið yvir á líkskurðborðið, sum er úr marmori. Hann hyggur at journalinum og táseðlinum. Navnið passar. So hyggur hann at pappírsstrimlinum við hjartarútmuni, ið defilibratorurin skrivaði teir seinastu 20 minuttirnar, roynt varð at fáa lív í mannin.

Klokkan níggju henda morgunin koma landslæknin Høgni Debes Joensen og løgreglumaðurin, Kári Thorsteinsson. Teir skulu fremja eitt av umleið fimmti líksýnum, ið teir hava um árið. Høgni kagar gjøgnum sjúkrasøguna hjá manninum. Dungin av pappírum um tann deyða er ikki serliga digur. Ímeðan hjálpir Kári Ova at lata líkið úr. Ove bindur band um hjúnabandsringin hjá deyða manninum, smyr uppvaskisápu á fingurin og togar hann av. Buksur og undirbuksur verða kliptar av, men onkur pløgg verða tikin av í heilum líki og løgd saman av einslistum til tey avvarðandi. Nú er maðurin nakin, sum tá ið hann troðkaði inn í lívið.

Klokkan hálvgum tíggju fer Høgni í plastikkkittil og tvinnar gummihandskar. Hann rembir sær, meðan Ove stendur hendur í hupp og bíðar í kritahvítum klæðum.

Høgna dámar best at tosa beinleiðis til skrivara, sum í hesum sambandi er Kári.

– Tað er tryggast at skriva beinanvegin, tí viðhvør hava vit fleiri líksýn í einum. Tað kemur javnan fyri, at trý deyð fólk liggja her samstundis. Einaferð høvdu vit níggju upp á ein seinnapart, minnist Høgni.

Hurðin í líkrúminum fer aftur, og Ove koppar stívnaða líkinum á, so ryggurin kemur til sjóndar. Deyðsváttanirnar eru á donskum, landslæknin og løgreglumaðurin eru danskir tænastumaður, og landslæknin dikterar um deyða føroyingin á donskum. Eins og so mangan áður byrjar hann við hesum orðum:

– Veludtalte, overvejende blålilla dødspletter på ryg- og sideflader.

### Ikki kvaldur

Ove leggur líkið á ryggin aftur og fer í klæðnadungan at leita í lummunum hjá tí deyða. Har finnur hann snorut køkspappír. Maðurin hevur kanska havt krím, vísir Ove á, meðan Høgni tekur hart í liðirnar á líkinum:

– Veludtalt dødsstivhed af arme og ben, sigur hann og orðar víðari um onkrar skurðviðgerðir, ið bæði síggjast í journalinum og sum gomul arr á líkinum. Við linjál mátar Høgni arrini upp, og við penni skrivar Kári støddina niður. Skurðsl og skeinur verða eisini skrásett eins og litprikað prýði á húðini.

Høgni trýstir á bringuna. Tað brakar í, og smáir vætudropar loypa úr munninum á líkinum. Bringbeinið er brotið, sum tað næstan altíð er, tá ið hjartahjálp er veitt. Hetta verður skrivað niður.

Høgni ger vart við, at einki stóð í løgreglufrágreiðingini um ein skruvuleysan snudd, sum maðurin allarhelst hevur fingið á høvdið í sjálvum deyðsdøttinum. Tað verður nú skrivað. So trýstir Høgni hart um høvdið við báðum hondum; helst fyri at kanna, um maðurin hevur brotið skallan. Hann hyggur eisini undir nakkan og eftir bløðingum inni í oyrunum.

– Eingin løstur í høvdinum, staðfestir hann á føroyskum og nágreinar:

– Brýtur man skallan, so spreingist trummhinnan ofta, og tað kann síggjast sum bløðing. Tað er eitt greitt tekin, sum Kári man hava sæð ofta.

Síðan tekur Høgni eina pinsett, lyftir eygnalokini upp og rullar tey afturav. Bløðingar í smáu æðrunum her kunnu eitt nú benda á, at maðurin er kvaldur. Álvarslig epileptisk herðindi og blóðtøppur í hjartanum kunnu eisini síggjast á henda hátt. Men bløðingar eru ongar.

– Her er einki, og pupillurnar eru líka stórar, staðfestir Høgni.

Síðan spennir hann munnin á manninum upp og stingur fingurin so langt niður í hálsin sum gjørligt.

– Eg skal vita, um ein karrybolli ella medistari situr í hálsinum. Tað er tað ikki, staðfestir hann alt fyri eitt og togar fingurin úraftur.

– Tað er annars næstan á hvørjum ári, at vit finna ein, sum hevur okkurt í hálsinum, sigur hann við Kára og tosar víðari á formliga arbeiðsmálinum:

– I svælget står lidt tyndtflydende, strågul væske.

Ove tekur ein pappírslappa at turka vætuna, ið er spruttað upp á bringuna á líkinum.

### Akutt myokardieinfarkt

Arbeiðið hjá Høgna endar nú formliga:

– Hann hevur sukursjúku, hann hevur ov høgt kolesterol, og hann hevur verið í viðgerð fyri ov høgt blóðtrýst. Eg vil siga, at hann er deyður av akuttum blóðproppi í hjartanum; ella sum vit kalla tað, akutt myokardieinfarkt. Ynskja tit eina obduktión?

– Nei, svarar Kári.

– Vilja tit hava nakrar prøvar; alkohol ella medisin ...

– Nei! Einki bendir á nakað ólógligt. Her er einki í hesum, staðfestir royndi løgreglumaðurin.

– Ná! Tað vilja tit ikki. Politiið sigur, at eingin orsøk er til obduktión. Tað eru teir, sum bestemma; ikki eg, skemtar Høgni og hyggur rannsakandi upp á blaðmannin.

– Hetta er eitt ógvuliga pent

Sosialurin